# Viðhefti 6 vandametingar og sáttmálar

## Reyðlistin í sambandi við hesa kanning

Fyribils reyðlistin fyri Føroyar (Fosaa et al, 2005) gevur eitt yvirlit yvir tey mest hóttu, viðkvomu og sjáldsomu sløgini av plantum og fuglum í Føroyum.

Á talvuni niðanfyri síggjast tær styttingar, ið verða nýttar í reyðlistum. IUCN stendur fyri "International Union for Conservation of Nature".

| IUCN styttingar | Á føroyskum |
|---|---|
| **EX** (Extinct) | Útdeytt |
| **RE** (Regionally Extinct) | Útdeytt í Føroyum |
| **CR** (Critically Endangered) | Sera hótt |
| **EN** (Endangered) | Hótt |
| **VU** (Vulnerable) | Viðbrekið |
| **NT** (Near Threatened) | Nærum hótt |
| **LC** (Least Concern) | Ikki hótt |
| **DD** (Data Deficient) | Dátutrot |
| **NE** (Not Evaluated) | Eingin meting |

Talva 1. Talvan vísir IUCN styttingar og merking teirra á ávikavist enskum og føroyskum.

Fuglar og plantur við metingini CR, EN og VU eru hótt. Tað, ið ger at fuglastovnar og plantur verða mett at vera hótt, er gongdin í stovnsstøddini og lendi. Stovnsstødd av plantum og fuglum kann vera minkandi orsakað av t.d. veiðu og lendistøku. Eisini kann stovnsstødd vera ávirkað av stødd á lendi, ið fuglurin og planturnar nýta. Lendið kann vera t.d. lítið ella minkandi (orsaka av landbúnaði, vegagerð og øðrum). Tí er stødd á lendi, ið fuglurin og planturnar hava at búleikast á, eisini avgerðandi fyri reyðlistametingina hjá fuglum og plantum.(t.d. iucnredlist.org)

### Bonn sáttmálin (Convention on Migratory Species CMS) í sambandi við hesa kanning

Føroyar eru fevndar av Bonn sáttmálanum, ið hevur til endamáls at verja ferðandi djór. Við sáttmálanum eru tvey fylgiskjøl, har fyrsta fylgiskjalið, appendix I, nevnir ferðandi djórasløg, sum eiga at verða friðað og livistøð teirra endurskapt.
Í appendix II eru djórasløg nevnd, har neyðugt er við ítøkiligum altjóða avtalum,

um sløgini skulu verjast. Tað eru gjørdar fleiri ítøkiligar avtalur um vernd av djórum, ið eru beinleiðis knýtt at sáttmálanum.
Tó at sáttmálin um ferðandi djórasløg er settur í gildi fyri Føroyar, er eingin av avtalunum, sum eru knýttar at sáttmálanum, settar í gildi.

Ein av høvuðsorsøkunum til, at Bonn sáttmálin fevnir um hesi sløg, er minking av lendi, ið hesir fuglar nýta. Hugsað verður bæði um støð, ið fuglarnir nýta til hvíld í flytitíð, um vetrarvist og har fuglarnir reiðrast (cms.int).

**Bólking av plantutíðleika í Føroyum sambært eldri kanningum**

Í *Føroysk Flora* s. 14 (Jóhansen, 2000) verður tíðleikin av plantusløgunum bólkaður í stigum, sambært teimum kanningum, ið eru gjørdar áðrenn ár 2000, sí talvu 2.

| | | |
|---|---|---|
| Plantan er funnin úr 1 upp til 10 ferðir | Sera sjáldsom | S.sj. |
| Plantan er funnin millum 11 og 25 ferðir | Sjáldsom | Sj. |
| Plantan er funnin millum 26 og 75 ferðir | Her og har | H.h. |
| Plantan er funnin millum 76 og 150 ferðir | Vanlig | Vanl. |
| Plantan er funnin meira enn 150 ferðir | Sera vanlig | S.vanl. |

Talva 2. Talvan vísir styttingar og merking teirra. Hesar styttingar eru brúktar í tekstinum. Plantusløg við tíðleikastiginum S.sj eru øll á tí føroyska reyðalistanum.